

Mynd: Harald Pettersen, Statoil

# 88 boripallar skulu út av marknaðinum komandi tvey árini

**Jógvan Hugo Gardar**

15.06.2015 - 23:23

Oljan.fo

Greiningarfyritøkan Rystad Energy hevur almannakunngjørt eina kanning, ið vísir at til og við 2017, so fara 88 oljuboripallar at verða tiknir úr framleiðslu. Ongantíð áður eru so nógvir boripallar tiknir úr framleiðslu uppá so stutta tíð.

Sparingarnar hjá oljufeløgunum raka eigararnar av boripallunum hart. Sambært Rystad Energy vóru 262 flótandi boripallar í virksemi í 2014. Í 2016 vera bert 220 til arbeiðis.

Samstundis eru 64 nýggir boripallar á veg inn á marknaðin. 24 av hesum koma í ár, 22 í 2016 og 18 í 2017. Higartil í ár eru tíggju av teimum 24 lidnir.

Rystad energy hevur skrásett at fyritøkurnar sum byggja boripallarnar royna at útseta byggingina so nógv sum til ber. Hetta kann merkja at pallarnir koma millum eitt hálvt og eitt ár seinni enn ætlað.

Joachim Bjørni hjá Rystad Energy sigur at tey ikki hava sæð nakra so stóra kreppu fyri boripallar síðani oljukreppuna í 1985.

Mett verður at 36 pallar skulu leggjast í 2016, fyri at fáa javnvág í tørvin á marknaðinum. Vend kemur helst í í 2017, tá tørvur aftur verður á fleiri boripallum, metir Rystad Energy.

